

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 11 - 2011

# Amnesty hartar Shell fyri dálking

Oljufelagið Shell er aftur komið undir altjóða trýst, tí at felagið hevur ikki ruddað eitt øki í Nigeria, sum bleiv illa dálkað eftir ein oljuleka fyri trimum árum síðani. Tað hevur víst seg, at dálkingin hevur næstan forkomið lívsgrundarlagnum hjá nógvum fiskimonnum og bøndrum. Amnesty International krevur í einari nýggjari frágreiðing, at Shell skal seta upp til eina milliard dollarar ella einar 5,4 milliardir krónur av til at rudda tað dálkaða økið í Ogoniland í Nigeria. Sambært felagsskapinum hevur dálkingin hjá Shell tikið lívsgrundarlagið undan umleið 69.000 fiskimonnum og bøndrum. -Fólk, sum liva av fiskivinnu, hava mest inntøkugrundarlagið orsakað av dálkingini, og grøðin hjá bøndrunum er minkað nógv. Samanumtikið eru møguleikarnir hjá fólkinum í økinum at liva av fiskivinnu og jørðini skerdir av dálkingini, skrivar Amnesty International í teirri nýggju frágreiðingini. Shell hevur viðgingið, at felagið hevði ábyrgdina av tveimum lekum í Ogoniland í 2008, og ein talsmaður fyri felagið sigur, at arbeiðið at rudda tað dálkaða økið er byrjað. Talsmaðurin leggur tó afturat, at oljustuldur og herverk á rørleiðingar var høvuðsorsøkin til dálkingina.